# Lærugreinaráðgevi

**Starvið**
Í Landsmiðstøðini eru nakrir ráðgevatímar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2005.

Ráðgevingin fevnir í fyrsta lagi um **skúlabyrjan, serundirvísing, støddfrøði, alis- og evnafrøði og náttúra/tøkni.**

Samanlagt eru 18 lønartímar um vikuna at søkja. Ein lønartími er umleið 1,6 *fyrisitingartímar.* Vanliga hevur lærugreinaráðgevi 6-12 lønartímar um vikuna.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein og starvsøki, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta kt í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevar verða settir eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og løntir í lønarflokki 30.3. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

**Starvslýsing**
Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Eitt nú verður sagt:

- Ráðgevin skal í øllum lutum virka fyri einari námsligari menning í skúlanum
- Ráðgevin skal støðugt halda seg kunnugan við ta menning, sum er á námsliga, fakliga og tøkniliga økinum
- Ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í einstøku lærugreinunum

Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum og í toymum.

**Umsókn**
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi týsdagin 10. mei 2005.

Gjøllari upplýsingar fáast frá Petur Simonsen, stjóra á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

Landsmiðstøðin

***Landsmiðstøðin** er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálaráðnum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri skeiðum við fakligum og námsligum innihaldi*

Heimarøktin og Serforsorgin
Serstovnadeildin
Sambýlið, Niðarugøtu 15
FO-188 Hoyvík

# Starvsfólk

## til Sambýlið í Niðarugøtu 15 í Hoyvík

Innan Heimarøktina og Serforsorgina við fyribils tænastu í Sambýlinum í Niðarugøtu 15 í Hoyvík eru 2 fulltíðar størv, 40 tímar um vikuna, leys til setan skjótast tilber, tó í seinasta lagi 1. juni 2005. Sambýlið í Niðarugøtu 15 er eitt sambýli fyri seinheilaskadd fólk í aldrinum 18 til 66 ár. Sambýlið er skipað undir Serstovnadeildini, sum er deild undir Heimarøktini og Serforsorgini.

Í sambýlinum koma fýra seinheilaskadd fólk at hava fastan bústað og ávísa viðgerð. Hetta eru íbúgvar hvørs virkisstøði ber dám av truplum kognitivum avleiðingum og hjá onkrum er eisini talan um umfatandi fysisk handikapp. Tilboðini í gerandisdegnum verða tilrættisløgd eftir tørvinum hjá tí einstaka.

**Førleikakrøv**
Vit sóknast eftir starvsfólkum, ið hava viðkomandi pedagogiska-, terapeutiska- ella røktarliga útbúgving og ávísan kunnleika til økið. Umráðandi er, at umsøkjarar hava fakligan áhuga og góð samstarvsevni. Ætlanin er at seta ein fleirfakligan starvsfólkabólk, sum í felag skal loysa allar uppgávur í sambýlinum.

**Vit bjóða**
Eitt arbeiði har tú hevur ávirkan á innihaldið í starvinum og gerandisdagin hjá búfólkinum. Eisini er møguleiki fyri at fáa tær størri kunnleika til økið, og verða við til at menna stovnin. Vit eru: Ein fysioterapeutur og seks pedagogar, sum fegin vilja hava tveir glaðar og positivar arbeiðsfelagar.

**Løn- og setanartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, at arbeiðstíðirnar eru skiftandi, so talan verður um bæði dag-, kvøld- og samdøgursarbeiði eins og vikuskiftisarbeiði og serstakar dagar. Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreist**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum og C. V. skulu vera sambýlinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. apríl kl. 12.
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran í Sambýlinum, á tlf. 313463 ella 213363.

**Sambýlið**
Niðaragøta 15
FO-188 Hoyvík
Att.: Leiðarin

FARO E
LAW
Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir
*Tosið við:*
**Eyðfinn Jacobsen**
**advokat**
**Jens Wang**
**advokatfulltrúa**
Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FI-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo
www.faroe-law.fo
Sosialurin

## Runavíkar kommuna lýsir eftir

# feriuavloysarum

## til Heimið á Mýrunum

Søkt verður eftir røktarstarvsfólkum, sum feriuavloysarum á Heiminum á Mýrunum.

Feriutíðin byrjar fyrst í mai mánað, og varar til mánaðarskifti august/september.

8 minnisveik fólk búgva á heiminum. Endamálið við heiminum er, at geva búfólkunum, ið hava serligan tørv á umsorgan, eina trygga og stimbrandi tilveru. Vit ynskja avloysarar ið hava hug og hegni til at vera um minnisveik fólk. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

Áhugað kunnu venda sær til Unn Justinussen, leiðara, á tlf. 477080 ella 217088.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til

**Runavíkar kommunu**
Att. Sosiala deild
Heiðavegur 26
600 Saltangará

Umsóknarfreist: týsdagin 19.04.2005

# Aðalfundur

## í Føroya Arbeiðarafelag

Fráboðaði Aðalfundur Føroya Arbeiðarafelags verður

**hósdagin og fríggjadagin 28.-29. apríl**

í B36-húsinum í Gundadali, Tórshavn.
Byrjað verður báðar dagar kl. 10.00.

Dagsskrá sambært lógum felagsins og lógarbroyting.

**Føroya Arbeiðarafelag**

LEIGA
AMBOÐ
&
MASKINUR
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Lesið internet Sosialin !
